# Seks ára gomul børn

HERI MOHR



Í Dimmalætting nr. 61, 31. mars, skrivar Liljan Weihe um eina hending, sum fór fram á floksfundi Tjóðveldisins tann 29. mars. Hon greiðir frá, at Kristina Háfoss, landsstýrislimur við mentamálum, legði fyri í sínari røðu við at siga frá einari hending:

”Ein dagin kom mín tá seks ára gamla dóttir heim frá barnagarðinum, og spurdi um danir ráddu í Føroyum.”

”Nei, í Føroyum ráða føroyingar, segði Kristina Háfoss við dóttir sína, og helt tað vera illa áfatt í Føroyum, um lítil børn vórðu uppfostrað til at trúgva, at í Føroyum ráddu danir.”

”Dóttirin hevði í barnagarðinum kjakast (sic!hm) við ein av sínum starvsfeløgum (sic! hm), ein seks ára gamlan drong, um, hvørt føroyingar ella danir ráddu í Føroyum.” Kristina Háfoss fór so at kanna, hvør mundi eiga drongin, sum gongur í sama barnagarði sum hennara dóttir.

Vit ímynda okkum, at okkara í løtuni verandi landsstýrislimur við mentamálum er farin í barnagarðin fyri at fáa upplýsingar um hendan 6 ára gamla smádrongin, sum vísti seg at vera sonur Kaj Leo Johannesen, og ”salurin flenti í kíki.”

Um tað er satt, at ein búskapar/løgfr. (samb. telefb.) p.t. limur í Føroya landsstýri við mentamál um hendi alment hevur sagt tað, sum Liljan Weihe endurgevur, eru dimensiónirnar so ræðandi, at fólk við vanligum viti og skili gána sum sligin á nevið.

Hetta man verða sjálvt sáið til ónda happing.

Slíkur hugburður hevði krúnaðar dagar í tí upplýsta, men av sjúkligum, ekstremum tjóðskaparrørslum fyri 70 árum síðani so illa pínt Evropa.

# Nú er komið at evstu stund

PALLI DALSGAARD



Tað er ein gamal spádómur í Føroyum, at loysingin, tá hon einaferð kom, fór at koma úr Danmark og ikki úr Føroyum. Danir blivu at keðast av føroyingum so at teir blivu bidnir um at sigla sín egna sjógv. Nú er farið at líkjast hesum spádómi, danski statsministarin hevur haft peikifingurin á lofti og tala at. Næsta stigið hjá okkum má vera loysing og tá manglar so lítið í. Tað sær ikki matari út, enn at Javnaðarflokkurin er blivin ein loysingaflokkur. Fleiri av okkum, sum nú eru blivin eldri og gomul, eru alt annað enn fegin um at so skal vera. Eingin tinglimur í flokkinum sigur eitt einasta orð, tey lata bara standa til. Minka blokkin til at hjálpa til loysing við, tað er so ørt, sum hugsast kann. Tit eiga einki í tí, ið eftir er av blokkinum. Blokkurin ið eftir er, hoyrir fyri ein stóran part til tað føroyska sjúkhúsverkið og pensjonistarnar. Sum tað ljóðar, er ikki eiti á fyrimunir vit fáa, um vit fáa loysing, alt annað er gloymt. Tað vit hava hevur ongan týdning, tað verður ikki viðlíkahildið, vit vilja einans hava meir. Tað týðir uppá, at vit eru kedd av at hava tað gott. Tí gott hava vit tað ídag, sum ongantíð áður. Vónandi stendur Anders Fogh Rasmussen aftanfyri síni orð, so okkara politikkarar fáa nakað at hugsa um og koma aftur á jørðina. Fyri mongum árum síðan hoyrdi eg ein mann, ið var javnaðarmaður, siga: at Tjóðveldi kom ikki at fremja loysing í Føroyum. Bleiv nøkur loysing, so kom hon frá Javnaðarflokkinum. Hesir báðir spádómar, ið her eru nevndir eru at ræðast. Eitt er heilt vist, verður loysingin verunleiki, so má repast á øllum økjum og tað við lít. Livifóturin má munandi niður, um ikki so langt niður sum í Portugal ella Kosovo.

# Eingin olja í William




*BP segði seg vilja bora niður á 4750 metrar, áðrenn farið varð undir boringina. Sí skurð av undirgrund og boriætlan. Nú verður sagt, at BP er komið niður á 3.351 metrar og hetta er í tráð við avtaluna við Jarðfeingi. Kelda BP*

**BP boraði niður á 3.351 metrar og fann onga olju sigur felagið í skrivi**

WILLIAM TURRUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

BP váttar við hesum, at boringin av leitibrunninum William er steðgað. Steðgað varð, tá komið var niður á høvuðsmálið (primary target), sum var 3.351 metrar undir havyvirflatuni. Rakt var ikki við kolvetni í brunninum.

William brunnurin varð boraður á 743 metra havdýpi, 60 sjómíl í ein landsýnning úr Føroyum, av boripallinum Transocean Rather. Transocean Rather verður nú fluttur úr føroyskum sjóøki.

Leitiboringin, sum nú er framd, nøktar treytirnar í leitiloyvinum, og eru oljufeløgini nú loyst frá allari ábyrgd og skyldum í sambandi við William brunnin.

Oljufeløgini vilja nú meta um upplýsingarnar frá brunninum, áðrenn støða verður tikin til, hvat víðari hendir við leitiloyvi 007 sigur BP í tíðindaskrivinum.

William brunnurin er borðaður á basaltøki í leitiloyvi 007.

Oljufeløgini, ið luttóku í boringini í leitiloyvi 007 eru: BP (50%), Shell (25%) og Anadarko (25%). Anadarko var við, sum borin luttakari.

# Kolvetni kunnu liggja djúpri

**-Av tí, at tað ikki kann útilokast, at kolvetni kunnu vera djúpari, enn nú er borað til, er brunnurin ikki endaliga, men fyribils frágingin. Tað verður tí lættari hjá møguligum áhugaðum feløgum at halda fram við boringini sigur Tórbjørn Jacobsen, oljumálaráðharri í viðmerking**

**William turrur**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Leitibrunnur 6005/13-1A, sum pallurin Transocean Rather hevur borað fyri BP samtakið á loyvi nr. 007, er nú liðugt boraður. Brunnurin, sum er á 742 metra havdýpi, røkkur 3.351 metrar niður undir sjóvarmálan sigur Jarðfeingi í tíðindaskrivi

Í brunninum hevur ikki verið rakt við kolvetni.

Tekniskir trupulleikar hava verið við boringini, umframt at ringa veðrið í vetur hevur tarnað arbeiðinum. Jarðfrøðiligu viðurskiftini vóru ikki sum væntað undan boringini m. a. við tað at basaltfláirnar vóru drúgvari enn frammanundan mett. Hetta hevur við sær, at gosgrýti var at finna á dýpinum, har høvuðsmálið við boringini varð roknað at vera, og at tey jarðløg, ið vónir eru um kunnu innihalda kolvetni, tískil liggja djúpari enn brunnurin rakk.

Av tí at ikki varð borað gjøgnum gosgrýti í hesum umfarinum, og at tað framvegis eru vónir fyri, at kolvetni kunnu finnast, varð gjørt av at fara frá brunninum á ein hátt, sum ger tað møguligt at taka upp aftur arbeiðið seinni.

-Henda boring hevur givið okkum týðandi, nýggja vitan um jarðfrøðina nærhendis Munka-grunninum, og hevur sostatt verið við til at økt um okkara vitan um jarðfrøðiligu menningina í økinum sigur Jarðfeingi.

Landsstýrismaðurin í Fiski- og Tilfeingismálum, Torbjørn Jacobsen, sigur, "Vit staðfesta, at í fyrsta umfari hevur henda boringin ikki rokkið við kolvetni í brunninum. Av tí, at tað ikki kann útilokast, at kolvetni kunnu vera djúpari, enn nú er borað til, er brunnurin ikki endaliga, men fyribils frágingin. Tað verður tí lættari hjá møguligum áhugaðum feløgum at halda fram við boringini. Vit mugu eisini staðfesta, at boring á hávetri setir stór krøv til boriútbúnaðin, men tað er at fegnast um, at boriarbeiðið út frá einum trygdarsjónarmiði hevur gingið væl."



*Tórbjørn Jacobsen, oljumálaráðharri:*
*- Vit mugu eisini staðfesta, at boring á hávetri setir stór krøv til boriútbúnaðin, men tað er at fegnast um, at boriarbeiðið út frá einum trygdarsjónarmiði hevur gingið væl."*